# Steypafinalan verður leygardagin

Leygardagin 4. juli verður ovari vøllur í Gundadali karmur um steypafinaluna hjá kvinnum. Finalan verður millum oddaliðini í bestu deildini, KÍ og AB. Liðini hava sama stigatal í landskappingini. Dysturin byrjar klokkan 16.00.



# Eto'o er ikki ynsktur

Framtíðin hjá Samuel Eto'o er óviss. Barcelona hevur seinastu tíðina roynt at longt hansara sáttmála í spanska felagnum, men Josep Maria Mesalles, umboðsmaður hansara, sigur, at Eto'o ikki er ynsktur. – Vit hava prátað við leiðsluna tvær ferðir, og niðurstøðan er, at Eto'o ikki er partur av framtíðarætlanunum. Eg meti, at teir einans vilja hava eina stóra upphædd av pengum fyri hann, sigur Mesalles í sponskum miðlum.

# Togaði 30 stig aftur

**Annika Vang skeyt nýggj oyggjaleikamet á bæði 50 og 30 metrum, o 3g so stóð hon brádliga við gullinum í hondini, eftir at hetta annars tóktist vera burtur eftir fyrsta dagin**



Hitin var nógvur og konsentratiónin í topp. Sjálv kendi Annika, sum var hon við at kóka, tá skjótingin var av

Mynd: Álvur Haraldsen




Jákup Mørk

Í føroysku leguni snúi stórur partur av spenninginum seg um, hvørt tað skuldi eydnast Jógvani Niclasen at skjóta seg fram um hetlendska Billie Finney. Jógvan var annars 13 stig aftanfyri, tá dagurin byrjaði, men á 50-metrinum karvaði føroyski skjúttin sjey stig av hesi leiðslu. Og tá talan so gjørdist um metrundu á 30-metrunum var øgiligt trýst á hetlendinginum. Eitt trýst, sum hann tó akkurát stóð ímóti, tá hann fekk 349 stig móti teimum 354 hjá Jógvani, soleiðis at munurin í samlaðu støðuni gjørdist eittans stig.

Saamstundis hevði Annika Vang tó skotið seg frá einum fimta plássi og upp til gullið. Eitt úrslit, ið annars tóktist ógjørligt eftir fyrsta dagin, har hon var nummar 5. 30 stig aftan fyri fremsta skjúttan.

- Í gjárkvøldið setti eg mær fyri, at eg skuldi skjóta upp til mítt allarbesta í dag, og tað eydnaðist tíbetur. Eg hevði ein sera góðan 50-metur, har eg togaði 32 stig meira, og lá á einum deildum øðrum plássi, tá 30-meturin byrjaði. Og har gjørdi eg bart og skeyt upp til mítt allarbesta. Og tað sær tíbetur út til at hava givið úrslit.

Eftir dagin í gjár, sum tú als ikki vart nøgd við. Hvussu er kenslan so nú, tá tú stendur við gullinum.

- Eg eri ovurfegin um úrslitið. Hetta var tað, sum eg setti nøsina eftir. Tað er ein ótrúlig kensla, at hetta nú er yvirstaðið. Eg haldi at konsentratiónin hevur verið um tey 300 prosentini her í morgun, so eg rokni næstan við, at eg smelli um, tá eg komi á hotellið.

- Eftir dagin í gjár sá jú einki út hjá okkum, og sjálv hevði eg hesi 30 stigini at taka inn. Dagurin í dag hevur tó verið sera góður, og eg eri barasta so nøgd, sum eg kann vera.

# Tímdi ikki meira

**Absalon Hansen visti ikki, um hann var keyptur ella seldur, tá hann stútt og støðugt fekk nýggja plasering av vita frá dómarunum**




Jákup Mørk

Morgunin sá annars heilt góður út hjá Absalon Hansen, sum fyrradagin hevði lagt seg á odda í kappingini í recurve. Ein lakur 50metur syrgdi tó fyri, at eni skjútti frá Menorca slapp framum, og eftir heta stríddist Absalon fyri at halda sær í heiðursmerkjarøðini. Eitt stríð, sum gav úrslit at enda, men sum tóktist vera til onga nýttu, tá dómararnir brádliga søgdu, at einki stig var at fáa. Ella eisini búru teir fram, at føroyingurin hevði vunnið kappingina.

Endin á tí heila varð tó, at Absalon vann bronsu sum einstaklingur og gull saman við liðnum. Men áðrenn tað var komið somikið langt, hevði hann tvær ferðir verið nevndur um vinnari. Fleiri ferðir varð sagt, at hann vann silvur, og onkra løtu fekk hann eisini at vita, at einki heiðursmerki var at vinna yvirhøvur.

- Hetta hevur ikki verið stuttligt. Tá vit skutu 30 meturin, fekk eg at vita, at gullið stóð ímillum meg og ein annan. Eg skeyt øgiliga væl á 30 metrum, og eg helt sjálvur, at nú var gullið heima. So gjørdist eg brádliga nummar fýra, tá onkrir skjúttar kærdu um úrslitið. Ein nýggj samanteljing gav mær aftur gull, men endin á tí heila varð so, at eg vann bronsuna, segði Absalon Hansen við Rás2, tá endaligu úrslitini vóru komin.

-Míni tøl samsvara nú við tað, sum eg havi skrásett, og so vóni eg bara, at tað heldur. Eg tími so ikki at gera meira við hetta, staðfesti Absalon Hansen, sum mest av øllum bara vildi fáa sítt heiðursmerki. Eitt heiðursmerki, sum hann var nøgdur við, hóast alt.

Og so kunnu vit skoyta uppí, at hetta er ikki fyrsta ferðin, at Absalon hevur mist heiðursmerki, sum hann annars helt seg hava vunnið.

Tá leikirnir vóru á Jersey í 1997, fekk Absalon at vita, at hann hevði skotið seg til gull. Hálvan tíma seinni varð hetta tó broytt til silvur. Og sum eitt lítið kuriosum kann so eisini nevnast, at skjúttin, sum ta ferðina vann gullið, í dag sat sum høvuðsdómari fyri kappingina.